DAGSINS MEINING

Eitt politiskt mál

Alingin hevur havt stóran búskaparligan týdning og hevur nú leingi verið eitt gott alternativ til siðbundnu fiskivinnuna. Men nú er alingin komin í djúpa kreppu. Prísirnir eru í botni og eginpeningurin er um at hvørva. Umhvørvislig viðurskifti og sjúkur hava elvt til stórar trupulleikar. Marknaður er svikaligur og sveiggini eru øgilig, samstundis sum vit við bert 4% av heimsmarknaðinum onga ávirkan hava á prísleguna.

Oman á alt hetta kemur so gølan við tí sjúka og sjálvdeyða alilaksinum, sum sigst vera útfluttur frá føroyskum alibrúki. At útflyta sjúkan og sjálvdeyðan alilaks er bæði ólóligt og óklókt. Ólóligt tí tað stríðir móti heilsufrøðiligum ásetingum, óklókt tí tað kann koma allari føroyskari fiskivinnu aftur um brekku. Lagt kann verða afturat, at hetta eisini í sjálvum sær er skeivt, tí slíkt ger man ikki, hvussu so illa stendur til búskaparliga.

Nú hevur ikki skortað uppá fordøming og moralskt forargilsi frá øllum síðum móti tí fyritøku, sum er undir illgrun. Vit fara ikki at taka lut í hesi fordøming, so leingi einki er prógvað. Hinvegin reisir henda sakin nakrar spurningar, sum vinnulívið og politisku myndugleikarnir eru noyddir at fyrihalda seg til. Ein spurningurin er, hvørt eftirlitið er nóg gott ella við øðrum orðum: hvussu kann slíkt koma fyri? Hesum mugu avvarandi landsstýrismenn greiða løgtingi og almenningi frá. Gera teir ikki tað, eigur málið at verða reist á tingi.

Annar spurningur er, hvussu skulu slíkar gølur kunnu fyribyrgjast í famtíðini? Tað eigur eisini verða spurt, nær vit frá avvarandi myndugleikum fáa eina almenna váttan fyri, at talan er um eindømi - at bert ein fyritøka hevur útflutt sjúkan og sjálvdeyðan fisk. Somuleiðis mugu somu myndugleikar sum skjótast veita vissu fyri, at slíkt ongantíð hendir aftur. Niðurstøðan kann bert vera, at her í roynd og veru er talan um eitt politiskt mál og politiska ábyrgdin má stafestast. Harvið er eisini sagt, at talan er um ein trupulleika, sum má fáa eina politiska loysn t.v.s., at lógir, reglur og mannagongdir mugu endurskoðast og strammast upp alt fyri eitt. At málið skuldi fingið aðrar politiskar fylgjur er lítið hugsandi.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Karsten Hansen tváar hendur

Bárður Nielsen
løgtingsmaður

Tað er øgiligt Karsten Hansen landsstýrismaður við figgjarmálum roynir at renna undan nú búskapargongdin ikki er, sum hon hevur verið øll árini meðan hann hevur sitið sum landsstýrismaður. Nú veruleikin rennur upp fyri landsstýrismanninum í figgjarmálum og gullárinum siggja út til at verða av á hesum sinni fer hann tann lættasta vegin og leggur skylduna út til øll hini, men tað var nokk ikki annað væntandi tá tað fór at standa á figgjarliga. So leingi tað gekk væl var tað hann ið tók sær æruna og breggjaði sær óført um hvussu væl alt var stýrt við hansara hørðu hond, alt meðan útreiðslurnar øktust skjótari enn nakrantí og eru síðani hetta landsstýri tók við øktar við 1.100 mió. einans í rakstri og fyri hetta hava vit hvørki fingið sandoyarferju, undirsjóvartunnil, nýtt landsjúkrahús ella hálva suðuroyarferju, tí tað eru íløgur.

Tá landsstýrismaðurin leggur dent á, at allar eykajáttanir skulu verða útreiðsluneutralar skal gerast vart við, at tað bleiv ein eykajáttan játtað í apríl, ið kostaði útvið 75 mió. og sum skilst er játtan eisini givin til stuðulin fyri uppihaldspening uppá eini 5 mió. tí at flokkurin ikki kláraði at fáa semju innanhýsis um hesa sparing og longu nú er boða frá at tað eru fleiri eykajáttanir á veg.

Tað var ikki figgjarnevndin, ið lat verða við at taka skattalættan við á figgjarlógina, hann var heldur ikki við í uppskotinum, ið kom frá landsstýrismanninum og hóast andstøðan harðliga átalaði fleiri manglum í uppskotinum vísti landsstýrismaðurin øllum hesum átalum aftur og segði at tað var ikki vanlig mannagongd at hava tøl við á figgjarlógini, ið ikki vóru samtykt, men hetta var ikki galdandi tá tað snúði seg um sparingar, ið kravdu lógarbroyting. So tað tykist løgið og má merkjast undarligt hjá samgongufeløginum í figgjarnevndini, at landsstýrismaðurin nú vaskar alt yvir á meirilutan í figgjarnevndini.

Eisini verður vístá at hóast blokkurin bleiv skorin við 366 mió. um árið fyri tveimum árum síðani hevur gjaldføri landskassans verið so gott sum nú, men hetta er ikki veruleikin um vit hyggja eftir innistandandi í Landsbankanum. Har standa í juni 2003, 2.247 mió. og minstainnlánið er 1.515 mió. so tøkar eru 732 mió. ímóti 750 mió. somu tí síðsta ár. So hóast vit higartil hava skert í blokkinum umleið 500 mió. og multiplikatorávirkanin ikki hevur sligið ígjøgnum enn, má sjálvt landsstýrismaðurin hava fatað, at okkara búskapur ikki er so øgiliga væl fyri, sum hann roynir at fortelja sær sjálvum og øllum ørðum við.

Kristindómur og Deyðadómur?

Absalon Absalonsen
Blankagøta 14 , Tórshavn

Stundum frættist, at fólk, ið kalla seg persónliga kristin ella endurfødd kristin, siga seg taka undir við deyðarevsing. Men kann hetta sameinast.?

Ein endurføddur kristin hevur vissuliga sæð seg sjálvan standa sekan og deyðadømdan framman fyri Hinum rættvísa og livandi Gudi.Men hann var rættvísgjørdur fyri einki av náði. Endurfødd kristin eru eisini sannførd um, at teirra egnu syndir vóru ársøk til, at ein ósekur fekk deyðadóm og mátti lata lív. Straffin varð løgd á Hann. Men Móse-lóg ásetti deyðarevsing í fleiri førum, verður ført fram. Jú, so er, men upphavsmaður og fullkomari trúarinnar (kristindómsins) stóð beinleiðis yvir fyri einum slíkum máli. Tíðliga ein morgunin komu teir til hansara í templinum við kvinnu, sum lógin kravdi deyðadóm yvir. Teir kravdu við skriftunum í hond, at dómurin skuldi fremjast.

Lógin kom við Mósesi, men Hann sum kom við náðini og sannleikanum, hvussu greiddi hann hetta revsimál. ? - Hann boygdi seg niður og skrivaði við fingrinum á jørðina. Hvat hann skrivaði verður ikki endurgivið. Men teir, sum ákærdu kvinnuna, fingu nú høvi til at fremja dómin sjálvir. Tann av tykkum, sum er uttan synd, kasti fyrsta steinin á hana, vóru boðini. Síðani helt hann á at skriva, tá rímdu teir allir, teir elstu fyrstir.

Men hvat fekk hesar deyðadómskrevjarar at smoykja sær burtur? - Lítið man verða at ivast í, at tað var, tað teir lósu í sandinum har á Tempulplássinum, okkurt stóð har at lesa, sum teimum ikki hóvaði, vóru tað gerðir - ella tankar -, sum teir trúðu, at eingin vitsti um, ið har vóru almannakungjørdar, tað fáa vit neyvan at vita her í lívinum, kanska í ævinleikanum. Eftir stendur tó, at eingin av hesum deydarevsingar talsmonnum var uttan synd og sostatt fórur fyri at kasta fyrsta steinin.

Endurfødd kristin áttu eisini at minst til, at Gud ynskir ikki nakrans syndara deyða, men at øll skulu venda við og liva. Verða menniskju tikin av døgum, verður eisini møguleikin at venda við og fáa náði frá teimum tikin. Tilboðið um náði og fyrigeving Guds í Kristi Jesusi er til øll, eisini til teirra, sum av menniskjum verða deyðadømd.

Játta vit syndir okkara, er Hann trúfasrur og rættvíssur og fyrigevur og reinsar. Tað fekk ránsmaðurin á Golgata at sanna, tað fekk kong Dávid at sanna, hann kundi verði dømdur fyri bæði hor og morð, men hann angraði og játtaði og fann náði, hann fekk enntá heiti maðurin eftir hjarta Guds. Saul úr Tarsus, sum jagstraði tey kristnu og gjørdi, alt hann kundi, fyri at fáa tey sett á fangahús og dripin, vendi við og fann náði, og neyvan nakað mennisja hevur avrikað meir fyri kristindómin enn júst hann.

Gud er tann sami enn, náði og almáttur hansara við, kunnu vit, ørmu skapningar hansara, loyva okkum at verða náðileys.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstoðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Nær sleppur hevndarhugurin Jørgen Niclasen?

Áki Andreasen

Dagblaðið er ikki eitt blað, sum vanliga er so høgt í metum millum manna - tíbetur.

Eitt er Dagblaðið, sum er kent fyri persónsútspillingar og persónsforfylgingar gjøgnum tíðina, eitt annað er, hvat tingfólk Fólkafloksins føra fram, skuldi ein trúð - men so er helst ikki.

Á forsiðu í Dagblaðnum skírir Jørgen Niclasen forman tjóðveldisfloksins at vera óseriøsan. Grundgevingin er, at Høgni Hoydal hevur ført fram, at fyrireikingararbeiðið fyri yvirtøku av løgregluni og rættarskipanini er liðugt og kann standa sína politisku roynd.

At fyrireikingarnar eru um at verða lidnar er besta grundgevingin fyri á tí høga støði, politiski seriøsiteturin hjá Høgna Hoydal liggur - so er tað fingið upp á pláss.

Samgongusamráðingarnar

Vit minnast øll samgongusamráðingarnar - hvussu Fólkaflokkurin gekk og samráddist í loyndum uttan um Tjóðveldisflokkin, hóast Tjóðveldisflokkurin var grundarsteinurin undir samráðingarintiativinum hjá Fólkaflokkinum og Anfinn Kallsberg.

Vit minnast eisini, hvussu Fólkaflokkurin so nakkalangur mátti seta seg við samráðingarborið, eftir at Tjóðveldisflokkurin hevði gjørt greitt, at stuðulin til sitandi løgmann bleiv tikin aftur um so var, at Fólkaflokkurin framhaldandi royndi aðrar møguleikar enn tann, vit kenna í dag - tað var seriøsiteturin hjá Fólkaflokkinum undir samgongusamráðingunum!

Hvør heldur gjørdar avtalur?

Tá Jørgen Niclasen er løgtingsmaður fyri Fólkaflokkin, so vita bæði hann og fleiri við honum, at best er at tosa sum minst um, hvørjar avtalur eru hildnar og ikki. Fólkaflokkurin er helst tann flokkur, sum hevur brotið sítt egna samgonguskjal so ofta, at tað er vorin gerandiskostur. Hvør breyt allar avtalur um fólkaatkvøðuna? Hvør var klárur at farið inn og stuðlað fiskivinnuni við almennum pengum? Hvør var klárur at stuðla einum sambandsuppskoti við almennum pengum til eina skúla bygging? - soleiðis kundi eg hildið fram. Jørgen Niclasen eftirlýsir sparingum - hvat við omanyrinevndum dømum? - er tað tekin upp á sparihegni, nei eg spyrji bara.

Veruleikin er tann, at Fólkaflokkuin hevur so góðan hug at seta á og oyðsla við almennum pengum, at vit høvdu endað so nakkalong í einari kreppu, um Tjóðveldisflokkurin ikki hevði hildið eftir - við Karsten Hansen á odda. Hetta veit Jørgen Niclasen, men kortini vil hann leggja Tjóðveldisflokkin undir at fella sparingar - øll vita, at Tjóðveldisflokkurin er vissan fyri, at alt ikki verður futtað av fyri síðan at sleppa at nýta danskar pengar. Jørgen Niclasen veit eisini, at tað er fullur samanhangur millum búskapar- og loysingarpolitikk Tjóðveldisfloksins.

Við hevndarhuga gerst einki

Tá Jørgen Niclasen nýtir eitthvørt høvi at leggja eftir Tjóðveldisflokkinum, ting- og landsstýrðismanning floksins, so er tað ein beinleiðis avleiðing av, at hann mátti leggja frá sær. Hetta er eftirhondini vorðin almenn vitan. Hóast maðurin fekk at vita, at Tjóðveldisflokkurin fór at taka undir við einum missálti - langt áðrenn píniliga einflokssjónleikin hjá Fólkaflokkinum í Tinginum.

Jørgen Niclasen er kendur fyri at verða ein sambandsmaður í Fólkaflokkinum saman við m. ø Bjarna Djurholm og Óla Breckmann, men maðurin má sleppa hevndarhuginum og gera tað arbeiðið, sum er litið honum til frá veljaranum. Jørgen Niclasen kann ikki áhaldandi gera Føroya Løgting til ein klandursgarð, sum hann royndi henda dagin, tá hann legði frá sær.

Fólkaflokkurin má taka í egnan barm - og fáa Jørgen Niclasen til arbeiðis, ella er betur hann verður verðandi í Sørvági, tí við hevndarhuga gerst einki.

Hann kundi passandi nýtt Tjóðveldisflokkin sum fyrimynd: hóast løgmaður við einari tannleysari grundgeving sum løgmansstjórin hevði skrivað koyrdi Annlis Bjarkhamar frá, so arbeiðir Tjóðveldisflokkurin eftir gjørdum avtalum til frama fyri Føroya land og tí fólkið sum her býr, tí í hjørtum okkara býr frælsið!

Minningardagur teirra, sum lótu lív í ferðsluni:

Meiningsleyst!

Deyðin er ikki tað seinasta, eg eri bara farin um sýnina. Eg eri eg, og tú ert tú. Tað, sum vit áður vóru fyri hvør øðrum, tað eru vit enn.
Nevn meg við navni, nýt mítt yndisnavn, práta við meg um leyst og fast, sum vit altíð gjørdu.
Lat røddina vera hina somu, hóast sorg og sakn.
Flenn soleiðis sum vit vóru von at flenna saman at onkrum skemtiligum.
Hugna tær, brosa, hugsa um meg, bið fyri mær.
Lat mítt navn framvegis hoyra upp í okkara húski.
Tala um meg natúrliga, ikki við gráturødd.
Lívið er framvegis dýrabært, tað er, eins og tað altíð var, tað heldur á øld eftir øld.
Deyði og lív hoyra saman.
Hví skuldi eg farið úr huga, um eg fór úr eygsjón?
Eg bíði bara eftir tær, um eina stund, onkustaðni her í nánd, aftan fyri sýnina.

Rúna Sivertsen

Seinasta sunnudag var minningardagur teirra, sum lótu lív í ferðsluni. Í dag eru bert 358 dagar til næsta minningardag, sum verður 4. juli 2004. Tá fara menn og kvinnur einaferð enn at leggja blómur á tey stað, har ferðsluvanlukkur, ið førdu til deyðan, hava verið

Tann álvarsligi spurningurin er, um nakar av okkum, tú ella eg, verður atvoldin til, at blómur fara at verða lagdar á enn eitt stað næsta ár - eitt stað á vegnum, har vit koyrdu okkum ella í ringasta føri okkara besta vin í deyðan.

Seinastu dagarnar hava vit sæð nógv vøkur blómutyssi fram við vegnum. Blómurnar minna okkum á øll tey mongu, sum fórust í ferðsluni.

Sama, hvussu vakran búnað vit lata orð okkara í, ber ikki til at siga tað øðrvísi enn, at hesi í flestu førum doyðu av skilaleysari koyring. Oftast vóru tað ungir menn, sum koyrdu - menn, ið ikki vóru nóg búnir at taka ta ábyrgd, teimum varð litin í hendi.

Hagtølini siga, at tað her hjá okkum doyggja færri í ferðsluni nú enn fyri fáum árum síðani. Men fyri tann, ið missir sítt kærasta, siga hesi hagtøl einki. Hjá teimum er missurin hundrað prosent.

Vit eiga øll somul, bæði tey, ið seta seg aftanfyri róðrið og tey, ið gera lógir og áseta reglur, at gera tað, sum stendur í okkara makt, fyri at slíkar meiningsleysar vanlukkur ikki skulu henda.

Hjá tí, sum hevur ein at fara til við sorgini, er lættari enn hjá honum, ið einans hevur seg sjálvan til troystar. Men hóast vit trúgva, at ein er, ið er omanfyri alt, finst tó bert eitt orð, tá ferðsluvanlukkur kosta deyðan... Meiningsleyst!

Ungdómar við vanlukkustaðið hjá einum vinmanni

Mynd: Solby Eliasen